tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 24.10.2022 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

**Málsyvirlit**

**Til støðutakan**

| | | |
|---|---|---|
| 61/22 | 21/00407-5 | Felagsundirvising í føroyskum fyri tilflytarum |
| 62/22 | 22/00199-4 | SALT -Val av stýrislimi í Saltsilogrunnin 2022 |
| 63/22 | 22/00382-1 | Víðkan av frítíðarskúla á sumri 2023 -nú forskúli byrjar í Aug. 2023. |
| 64/22 | 22/00381-1 | Útibarnagarðurin frá sumri 2023 -nú forskúli byrjar aug. 2023 |
| 65/22 | 22/00386-1 | Musikkskúlin -virksemið 2022/2023 |
| 66/22 | 22/00375-2 | Áheitan frá stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy um inngjøld |
| 67/22 | 22/00301-2 | Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmáli og sáttmali viðv. skúlanet |
| 68/22 | 22/00395-3 | Samstarvsavtala um tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu |
| 69/22 | 22/00356-3 | Lukka mál - |
| 70/22 | 22/00396-2 | Lukka mál - |
| 71/22 | 21/00451-20 | Lukka mál - |

| Til kunningar | | |
|---|---|---|
| 40/22 | 22/00096-1 | Skattatøl 2022 |
| 41/22 | 22/00394-3 | Uppskot til hoyring til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skjalasøvn (Skjalasøvn við privatum savnindum) |
| 42/22 | 22/00390-2 | KF -uppskot til hoyring Løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin) |
| 43/22 | 22/00387-1 | SALT -Kunning um árið 2022 |
| 44/22 | 22/00397-1 | Til ummælis. Uppskot til løgtingslóg um klokkutíðina. |
| | | |

Kristin Michelsen lesur upp skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa.
Súsanna Bertholdsen ynskir viðmerkt, at hon tekur ikki undir við skránni, tí at málið «val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS» ikki er á skrá, og ynskjir hon at hetta mál verður sett á skrá, har liminir verða valdur samb. lutfallvalháttin.

Kristin Michelsen upplýsir, at val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS er avgreitt av Tvøroyrar býráð, við 2 viðgerðum og samtyktum í januar og februar 2021.

Kristin Michelsen upplýsir, at mál 71/22 verður tikið av aftur skránni orsakað av, at nýggir upplýsingar eru komnir til málið seinnapartin í dag, og verður málið tí viðgjørt á einum seinni býráðsfundi.

Til støðutakan

## 61/22
## 21/00407-5 Felagsundirvísing í føroyskum fyri tilflytarum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.04.2021 | 30/21 |
| 2 Býráðið | 27.05.2021 | 29/21 |
| 3 Mentanarnevndin | 08.06.2021 | 45/21 |
| 4 Mentanarnevndin | 12.10.2021 | 73/21 |
| 5 Mentanarnevndin | 14.06.2022 | 11/22 |
| 6 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 78/22 |
| 7 Býráðið | 29.09.2022 | 39/22 |
| 8 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 90/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 100/22 |
| 10 Býráðið | 24.10.2022 | 61/22 |

**Málslýsing: (kommunustjórin 21.04.2021)**
Umsitingin hevur í hin 21.04.2021, móttikið uppskot til samstarvsavtalu um felagsundirvísing í føroyskum fyri tilflytarum.

Samstarvsavtalan er gjørd av UMMR eftir fund millum allar borgarstjórar í Suðuroynni, undirvísarar í føroyskum fyri tilflytarar og Helenu Dam á Neystabø, umboðandi UMMR.

UMMR tekur ikki støðu til hvør kommuna tekur samskipanarleiklutin uppá seg. Men tað er helst nærliggjandi at hugsa, at tað verður Tvøroyrar kommuna, um kommunan er sinnað at taka uppgávuna. – Hetta var tað sum lá í luftini á fundinum við Helenu Dam á Neystabø á fundinum við allar borgarstjórar á fundi, ið var hildin í fundarhølinum hjá Varðin Pelagic 11. Mars 2021.

**Mentanarnevndin 23. apríl 2021:**
Einmælt samtykt, og mæla Tvøroyrar Býráð til at samtykkja samstarvsavtaluna. Málið verður beint í býráði.

**Kommunustjórin 24.05.2021**

Mælt verður til at:

1. Tvøroyrar kommuna átekur sær samskipanarleiklutin, at skipa undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum.
   a. (Verkætlanin er tó tengd av, at undirtøka fæst fyri hesum frá øllum kommununum í Suðuroynni)

2. Mentanarnevndin og kommunustjórin mæla til, -og hava tikið stig til- at heita á allar kommunurnar í Suðuroynni um at taka undir við at samskipa alla frítíðarundirvísingina í Suðuroynni, sum felags frítíðarundirvísing.
   a. Hugsanin er, at allir borgarar í Suðuroynni tá fáa eins og javnbjóðis møguleika at luttaka í øllum frítíðarundirvísingartilboðum, sama hvar í Suðuroynni undirvísingin fer fram, hvør lærugreinin er og hvør undirvísarin er.
   b. Metingin er, at ein felags kvøldskúli vil styrkja undirvísingina, har fleiri næmingar fáa møguleika at møta til undirvísing, og sannlíkt vil hetta eisini geva møguleika fyri, at undirvísarar kunna ferðast suður at undirvísa í lærugreinum, sum annars ikki vera boðin út í Suðuroynni.

3. Mælt verður til, at ein leiðari verður settur fulla tíð, sum samskipar alla frítíðarundirvísing í Suðuroynni – eisini undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar- og at kommunurnar bera raksturin av hesum eftir býtislykli javnbjóðis íbúgvum í hvørjari kommunu sær.

4. Fyri at røkka hesum málið, verður mælt til, at uppgávan verður løgd afturat samskipanaruppgávuni hjá leiðaranum av kvøldskúlanum á Tvøroyri, sum harvið –umframt framhaldandi kemur at virka sum leiðari av kvøldskúlanum- eisini fær ábyrgd av, at samskipa undirvísingina í føroyskum fyri tilflytarum í samráð við UMMR sum eitt verkætlanarstarv.

   a. Verkætlanin verður endurskoða av kommununum og UMMR við endan av komandi skúlaárið.

***Uppskot til samstarvsavtalu um felags kvøldskúlaleiðsla viðvíkjandi Føroyskum sum annaðmál í Suðuroynni –Uppskot hjá UMMR***

*Tímajáttanin, sum UMMR játtar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál verður umsitin av einari kvøldskúlaleiðslu í Suðuroynni, sum verður Tvøroyrar kommuna, sum tryggjar at lærarar, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál fáa løn sambært reglunum um serstaka frítíðarundirvísing. Og sum tryggjar, at undirvísingin verður fyriskipað sambært ásetingunum í lóg og kunngerð.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, er tað er kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu, sum samskiftir við UMMR og Undirvísingarstýrið um undirvísing í føroyskum sum annaðmál, tá ið tørvur er á tí.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, verður tað Tvøroyrar kommuna sum rindar lønirnar til lærararnar sambært lóg um frítíðarundirvísing, eins og at tað verður Tvøroyrar kommuna, sum søkir um endurgjald fyri løn til undirvísarar í føroyskum sum annaðmál sambært lógini um serstaka frítíðarundirvísing.*

*Meðan hendan avtalan er í gildi, er tað kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu, sum skal tryggja, at næmingar úr allari Suðuroynni fáa møguleika fyri at tekna seg til skeiðini í føroyskum sum annaðmál, og at skeiðini í føroyskum fyri útlendingar verða hildin sambært námsætlanini um "Føroyskt sum annaðmál".*

*Meðan henda avtalan er í gildi, skal kvøldskúlaleiðslan í Tvøroyrar kommunu skipa fyri regluligum samskifti við aðrar kvøldskúlaleiðslur í Suðuroynni viðvíkjandi fyriskipan av undirvísing í føroyskum sum annaðmál eins og samskifta við UMMR.*

*Miðað verður eftir, at teir undirvísarar í føroyskum sum annaðmál, sum hava undirvíst í føroyskum fyri útlendingar í Suðuroynni frammanundan, standa fyri undirvísingini í 2021 og frameftir.*

***Leikluturin hjá UMMR***
*UMMR vil fegin stuðla undir hesa gongd at samskipa viðurskiftini millum kommunurnar í Suðuroynni í mun til undirvísing í føroyskum sum annaðmál og integratiónsviðurskiftum annars, og játtar tí við hesum 100 tímar afturat til undirvísingina á vári 2021, so at felags játtanin til føroyskt sum annaðmál til Suðuroynna verður 310 tímar til várhálvuna 2021.*

**Býráðið 27. maj 2021:**
Tvøroyrar býráð tekur einmælt undir við at átaka sær leiklutin sum samskipari av undirvísing í føroyskum sum annaðmál og integratiónsviðurskiftum fyri allar tilflytarar í Suðuroynni. Einmælt samtykt.

**Mentanarnevndin 08. juni 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin bjóðar UMMR (Helenu Dam á Neystabø) um at møta á fundi við Tvøroyrar kommunu fyri at lýsa ætlanina um integratión og undirvísing í føroyskum fyri tilflytara.

**Kommunustjórin 24.09.2021**
UMMR hevur játta Tvøroyrar kommunu 800 tímar til til skúlaári 2020-2021 til serstaka frítíðarundirvísing í føroyskum sum annaðmál. Tímabýtið er 400 tímar til heysthálvuna 2021 og 400 tímar til várhálvuna 2022.

**Kommunustjórin 10.10..2021**
Forkv. í Mentanarnevndini ynskir at bjóða Lív Næs á fund at greiða frá hvussu støðuni á málinum »Felags undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum»

**Mentanarnevndin 12. oktober 2021:**
Lív Næs greiddi frá, at mentamálaráðið spyr regluliga um status á málinum. At tann 18. oktober verður byrja at undirvísa, og er talan um 38 næmingar, har 9 næmingar møta til dagsskeið.

Lív Næs ynskir, at kommunurnar sum eru við í skipanini fáa greiðu á, hvør starvast í skipanini, hvør er leiðari og hvør hevur ábyrgd av skipanini. At ein samskipari og visitator verður sett í starv.

Súsanna Bertholdsen greiddi frá fundinum í kommunufelagnum, har Helena Dam á Neystabø rósti støðuna í Suðuroynni, sum hevði tikið væl ímóti skipanini at undirvísa tilflytarar í føroyskum.

Einmælt samtykt, at Tvøroyrar kommuna tekur stig til at samskifta við allar kommunurnar í Suðuroynni, har m.a. greiða fæst á hesi viðurskiftir skjótast gjørligt.

**Kommunustjórin 10.03.2022**
Leiðarin av frítíðar- og kvøldskúlanum á Tvøroyri, Lív Næs hevði hin 9. mars, bjóða øllum borgarstjórum og umboðum úr øllum kommununum í Suðuroynni á fund í býráðssalinum hjá Tvøroyrar kommunu, at geva eina støðulýsing av málinum «Undirvísing í føroyskum fyri tilflytarum»

Eftir framløguna var avtala, at luttakararnir skuldi fáa tilsent tilfar, ið greinar kostnaðin av «Undirvísing í føroyskum fyri tilflytarar».

Breið semja var um, at kommunurnar vóru til reiðar at samstarva um ætlanina, men ynskiligt var at fáa greiðu á leiklutin hjá landinum, og játtanina frá landinum til ætlanina. Hetta fyri at greitt verður, hvørja ábyrgd og leiklut kommunurnar hava í ætlanini, og hvørja ábyrgd og leiklut landið hevur.

Møtt vøru:

- Eyðbjørn Thomsen, borgarstjóri, Sumba
- Bjarni Johansen, borgarstjóri, Vágs kommuna
- Petry Harginsdóttir Mortensen, býráðsskrivari, Vágs kommuna
- Jóannes Lisberg, borgarstjóri, Fámjins kommuna
- Delmar Tausen, borgarstjóri, Hovs kommuna
- Janus Thomsen, borgarstjóri, Hvalbiar kommuna
- Anita Vibergsdóttir, varaborgarstjóri, Tvøroyrar kommuna
- Lív Næs, Leiðarin av frítíðar- og kvøldskúlanum á Tvøroyri
- Fróði Mortensen, kommunustjóri, Tvøroyrar kommuna

**Mentanarnevndin 14. juni 2022:**
Lív Næs leiðari á Frítíðar og kvøldskúlanum kunnar um málið.
Lív Næs hevur samskiftir við Jógvan Sørin leiðari á Frítíðar og kvøldskúlin í Tórshavnar kommunu um hvussu Tórshavnar kommuna ætlar at skipa FSA ( Føroyskt sum anna mál) undirvísingina komandi skúlaár.
Einmælt samtykt at umsitingin fylgir upp uppá málið og samskiftir við Mentamálaráði um eina varandi ætlan viðvíkjandi FSA, við har til hoyrandi játtan frá Mentamálaráðnum.

**Kommunustjórin 11.09.2022**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá Uttanríkis- og Mentamálaráðnum dagf. 9. sep. 2022, at játtan á 1.100 tímar til undirvísing í føroyskum sum annaðmál skúlaárið 2022-2023, verður veittur til kommunala samstarvið millum kvøldskúlaskipanirnar í Suðuroy at undirvísa tilflytarum í Føroyskum sum annaðmál.

Stuðulin verður játtaður til kvøldskúlaskipanina á Tvøroyri, sum fær ábyrgd av at umsita stuðulin sambært ásetingunum í hesum játtanarskrivi, eins og at kunna allar vaksnar tilflytarar í Suðuroynni um møguleikarnar at fylgja skeið og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sum serstaka frítíðarundirvísing.

Innan karmarnar av hesari tilsøgn kann kommunala samstarvið í Suðuroynni skipa fyri serstøkum skeiðum fyri ukrainskum flóttafólki, ella bjóða hesum at taka lut í undirvísingini, sum verður fyriskipað fyri tilflytarar annars.

**Tímakostnaður og studningur**
Tímakostnaðurin skúlaárið 2022-23 er kr. 450,82. Íroknað tímakostnaðin eru frítíðarløn, leiðaraløn og lógarfest gjøld. *(Landskassastudningur er 100% av teimum stuðulsheimilaðu útreiðslunum)*

Tímabýtið er 550 tímar til heysthálvuna 2022 og 550 tímar til várhálvuna 2022.

**Treytir í sambandi undirvísingini í hesum skúlaári 2022 – 2023.**
Játtanin í 2022-2023 er treytað av játtan á Løgtingsins fíggjarlóg, og at niðanfyrstandandi treytir verða loknar.

Uttanríkis- og mentamálaráðið setir hesar treytir fyri kvøldskúlaskipanina, ið umsitur og skipar undirvísing í føroyskum sum annaðmál í Suðuroy: (Tvs. Kvøldskúlaleiðsluna hjá Tvøroyrar kommunu)

1. *Frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað, nemingatal og virksemi lestrarhálvuna september 2022 til desember 2022 skal sendast UMMR í seinasta lagi 15. Oktober 2022. Og frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað lestrarhálvuna januar 2023 – juni 2023 verður send UMMR í seinasta lagi 15. Februar 2023.*

2. *Undirvísingin í føroyskum sum annaðmál skal fylgja námsætlanini í føroyskum sum annaðmál. Námsætlanin er tøk á heimasíðuni hjá Próvstovuni.*

3. *Undirvísing kann eisini fyriskipast sum styttri málskeið fyri tilflytarum, sum ikki hava føroyskt sum móðurmál.*

4. *Frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað, nemingatal og virksemi lestrarhálvuna september 2022 til desember 2022 skal sendast UMMR í seinasta lagi 15. Oktober 2022. Og frágreiðing um, hvussu undirvísingin verður skipað lestrarhálvuna januar 2023 – juni 2023 verður send UMMR í seinasta lagi 15. Februar 2023.*

5. *Nemingur, sum verður tikin inn á útbúgvingina FSA, verður visiteraður. Kvøldskúlin sendir í seinasta lagi 15. oktober 2022 UMMR yvirlit yvir úrslitið í visitatiónini.*

6. *Nemingar, sum fylgja styttri skeiði í føroyskum sum annaðmál, verða visiteraðir, tá ið skeiðið er av, so at nemingur kann taka støðu til, hvussu hann/hon kann halda fram í undirvísingini. Um visitator og lærari metir, at nemingur, sum hevur fylgt einum styttri skeiði er førur fyri at fara til stigroynd, kann tað verða fyriskipað í samráð við leiðslu skúlans og Próvstovuna.*

7. *UMMR stuðlar tilgongdini at menna mannagongdir í samband við visitering. Tímajáttan er sett av til visitering, har skúlin kann søkja um ½ tíma til hvønn neming, sum verður visiteraður.*

8. *Lærarin, sum undirvísir í føroyskum sum annaðmál, ger í samráð við kvøldskúlaleiðsluna yvirlit yvir lisnar tímar.*

9. *Yvirlit verður ført um uppmøting.*

10. *Kunning verður send UMMR um setanarviðurskifti hjá lærarum, sum undirvísa í føroyskum sum annaðmál.*

11. *Tímar, sum UMMR hevur játtað til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, kunnu ikki brúkast til annað endamál innan frítíðarundirvísing.*

**Mentanarnevndin hjá Tvøroyrar býráð skal taka støðu til:**

1. At kvøldskúlaskipanin hjá Tvøroyrar kommuna átekur ábyrgd at umsita fyriliggjandi uppskotið og stuðulsjáttan frá UMMR til undirvísing í føroyskum sum annaðmál, stytt FSA.
2. At heimila kvøldskúlaleiðsluni hjá Tvøroyrar kommunu at seta undirvísarar í starv samb. játtnini til FSA og at kunna allar vaksnar tilflytarar í Suðuroynni um møguleikarnar at fylgja skeið og útbúgving í føroyskum sum annaðmál sum serstaka frítíðarundirvísing.

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað, og verður tikið uppá á einum seinni fundi.

**Kommunustjórin 28.09.2022:**
Samstarvsavtala var undirskriva 28.09.2022, har allar kommunur eru samdar um at skipa fyri felags FSA undirvísing í Suðuroynni. Avtlan gongur frá 1. Oktober 2022 til 1. Oktober 2026 ella inntil nýggj lóggávu verður givin á økinum. Avtalan kann sigast upp av báðum pørtum við átta mánaða ávaring.

Samstarvið er treytað av játtan til undirvísingartímar frá UMMR/US.
Næmingar rinda 500 kr. fyri undirvísingartilfar, sum verður goldið við tilmelding, og kommunurnar í Suðuroynni gjalda kr. 10,- pr. Borgara í kommununi til Tvøroyrar kvøldskúla fyri samskipan av FSA

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Kommunustjórin 14.10.2022**
Forkv. Í mentanarnevndini ynskir at mentanarnevndin tekur upp málið til nýggja viðgerð fyri at endurskoð samsýningina til samskiparan av FSA.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at heita á allar kommunur í samastarvinum, um at broyta gjaldið pr. borgara til samskiparan frá kr. 10,- til kr. 20,-. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini 18. oktober 2022, um heita á allar kommunur í samastarvinum at broyta gjaldið pr. borgara til samskiparan frá kr. 10,- til kr. 20,-
Fíggjarnevndin mælir til, at umsitingin innkallar allar kommunur til fund hesum viðv.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini, at umsitingin innkalla allar kommunur til fund hesum viðvíkjandi, og at hækka samsýningina, treyta av at allar kommunurnart í samstarvinum taka undir við hesum.

**62/22**
**22/00199-4 SALT -Val av stýrislimi í Saltsilogrunnin 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 94/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 102/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 62/22 |

**Málslýsing: kommunustjórin 15.10.2022**
Vísandi til viðtøkurnar fyri Saltsilogrunnin, skal Tvøroyrar kommuna velja ein stýrislim, ið situr í 4 ár.

Tvøroyrar býráð valdi umboði Charlotta Nielsen, at avloysa Desiree Mortensen í aug. 2020, sum ynsktið at siga nevndarsessin upp í úrtíð. Við tað at valskeiði byrjaði 14. Juni 2018 hjá liminum hjá Tvøroyrar kommunu, og hesin kann sita í 4 ár, skal støða takast til, hvussu framhaldið skal vera av nevndarsessinum eftir 1. Januar 2023.

Vísandi til at nevndin fyri Saltsilogrunnin hevur hin 15. Mars 2022 heitta á Uttanríkis og mentamálaráðið um at víðkað um nevndina í Saltsilogrunninum, frá verandi 3 limum til 5 limir, har Tvøroyrar kommuna kemur at hava ein fastan lim, mælir umsitingin til, at Tvøroyrar býráð fylgir áheitanina hjá Saltsilogrunninnum frá 15. Mars 2022, og velur ein nevndarlim at umboða Tvøroyrar kommunu í Saltsilogrunninum, eisini eftir 1. Januar 2023.

**Lógargrundarlag:** Kommunusfulltrúin, Viðtøkur fyri Saltsilogrunnin

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at Charlotta Nielsen heldur fram sum nevndar limur umboðandi Tvøroyrar kommunu.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini 18. oktober 2022.
Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at velja Charlottu Nielsen í stýrið fyri Saltsilogrunnin.

**63/22**
**22/00382-1 Víðkan av frítíðarskúla á sumri 2023 -nú forskúli byrjar í Aug. 2023.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.10.2022 | 22/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 108/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 63/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12. Okt. 2022**
Tvøroyar býráð hevur samtykt at bjóða børnum í kommununi forskúlatilboð til komandi skúla ár, ið byrjar aug. 2023.

Hetta viðførur, at Tvøroyrar kommuna skal taks støðu til viðkan av tilboðnum um ansing í frítíðarskúlanum.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt, at víðkað um tilboðið um frítíðarskúla til eisini at rúma tey børnini, sum byrja í forskúlanum í august 2023, og at hølini til hesi verður har útibarngarðurin heldur til.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Sosiala nevnd 18. oktober 2022, at víðkað um tilboðið um frítíðarskúla til eisini at rúma tey børnini, sum byrja í forskúlanum í august 2023, og at hølini til hesi verður har útibarngarðurin heldur til.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini at víðkað um tilboðið um frítíðarskúla til eisini at rúma tey børnini, sum byrja í forskúlanum í august 2023, og at hølini til hesi verður har útibarngarðurin heldur til.

**64/22**
**22/00381-1 Útibarnagarðurin frá sumri 2023 -nú forskúli byrjar aug. 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.10.2022 | 21/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 107/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 64/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12. Okt. 2022**
Tvøroyar býráð hevur samtykt at bjóða børnum í kommununi forskúlatilboð til komandi skúla ár, ið byrjar aug. 2023.

Hetta viðførur, at Tvøroyrar kommuna skal taks støðu til hvussu verður við verandi tilboð um ansing í útibarnagarði.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt, at tilboð um ansing í útibarnagarðinum steðgar, tá forskúlatilboðið byrjar í august 2023, og at verandi starvsfólk í útibarnagarðinum fáa bjóða starv í mest møguligan mun í barnaansingini.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Sosiala nevnd 18. oktober 2022, at tilboð um ansing í útibarnagarðinum steðgar, tá forskúlatilboðið byrjar í august 2023, og at verandi starvsfólk í útibarnagarðinum fáa bjóða starv í mest møguligan mun í barnaansingini
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá sosialu nevnd og fíggjarnevndini.

65/22

**22/00386-1 Musikkskúlin -virksemið 2022/2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 91/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 109/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 65/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 15. Okt. 2022.**
Forkv. í mentanarnevndini hevur avtala við leiðarann av musikkskúlanum Tróndur Enni, um at møta til fundin at kunna og støðulýsa Musikkskúlan 2022/2023.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 83 frá 29. mai 2017 um musikkskúlaskipan (Musikkskúlalógin)

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022, avsett til musikkskúlin §510 kr. 500.000,-**

§ 4. Musikkskúlaskipanin verður fíggjað soleiðis, at landið rindar løn til musikkskúlastjóran og meginfyrisiting, ferðing hjá musikkskúlalærarum og 50% av musikkskúlalæraralønum. Landið umsitur og avgreiðir lønir til musikkskúlalærarar.

Stk. 2. Kommunan endurrindar landinum 50% av musikkskúlalæraralønum.

Stk. 3. Kommunan lønar kommunala musikkskúlaleiðaranum og øðrum starvsfólki, sum kommunan setur í starv við musikkskúlan.

Stk. 4. Kommunan útvegar musikkskúlanum hóskandi høli, undirvísingartilfar, amboð og ljóðføri

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Tróndur Enni var á fundinum og greiddi frá um virksemið í Musikkskúlanum. Uml. 90 næmingar møta til undirvísing. Kunna var um, at nevndin fyri musikkskúlan hava viðgjørt og samtykt eina áheitan á kommunustýrini í samstarvinum, um at avseta eina afturvendandi játtan til hvørt fíggjarár á t.d. kr. 60.000,- til rakstur og keyp av instrumentum, og mælt verður til, at hetta fær virknað í inniverandi fíggjarárið FÆ2022. Tróndur Enni handaði skriv «Umbøn um játtan til keyp av instrumentum og viðlíkahaldið» til viðgerðar.
Mentanarnevndin samtykkir einmælt, at játta partin hjá Tvøroyrar kommunu áleið kr. 60.000,- í inniverandi fíggjar ári til rakstur og keyp av instrumentum, sum verður útvega við eykajáttan.
Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini 18. oktober 2022, at játta partin hjá Tvøroyrar kommunu áleið kr. 60.000,- í inniverandi fíggjar ári til rakstur og keyp av instrumentum, sum verður útvegað við eykajáttan.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini, treyta av at allar kommunur í samstarvinum taka undir við hesum.

**66/22**
**22/00375-2 Áheitan frá stýrinum fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy um inngjøld**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 18.10.2022 | 20/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 106/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 66/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 08.10.2022**
Umsitingin hevur móttikið teldupost frá leiðaranum í BHS vegna stýrið um at stýrið fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, hevur á stýrisfundi 21.09.2022 avgjørt, at heita á kommunustýrini í oynni um, at allur peningurin, sum kommunurnar fáa fyri eldraøkið verður goldin inn til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri (Kommunustýrislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 6. mai 2003

- Kapittul 8 Fíggjarumsiting
    - § 38. Fíggjarnevndin tekur sær av beinleiðis umsitingini av málum, ið víðvíkja kassa- og roknskaparverki og lønar- og starvsfólkaviðurskiftum kommununar.

Løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

- *§ 10. Tær kommunur, ið samstarva um at røkja heimatænastuna, eldrarøkt v.m. sambært § 4, verða eisini at býta tær útreiðslur, ið standast av at røkja uppgávuna, sínámillum. Hesar kommunurnar býta útreiðslurnar samsvarandi við talið av borgarum, ið 31. desember árið fyri eru 67 ár og eldri.

- Rundskriv nr. 9003 frá 15. februar 2017 um uppgerð av ársroknskapum hjá samstørvum um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og um mannagongdir fyri innrapporteringum um ársskiftið

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021 –2.21.61.802 Eldrarøkt, Gjøld til eldrasamstarvið

Parturin hjá Tvøroyrar er sum niðanfyri víst:

| TVK | 2019 | 2020 | 2021 | 2022 |
|---|---|---|---|---|
| **Avsett FÆ** | 18.563.000,- | 20.992.000,- | 20.752.932,- | 22.389.000,- |
| **Roknskapur realisera** | 21.829.000,- | 21.891.000,- | 22.507.000,- | |
| **Afturbering** | -20.696.000,- | -22.092.000,- | -22.469.000,- | |
| **Munur** | | 201.000,- | -38.000,- | |
| ***Eldriborgarar +67 TVK** | | | 342 | |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialu nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt áheitanina frá stýrinum fyri BHS, at allur peningurin, sum kommunurnar fáa fyri eldraøkið verður goldin inn til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Sosiala nevnd 18. oktober 2022, at allur peningurin, sum kommunurnar fáa fyri eldraøkið verður goldin inn til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini, at allur peningurin, sum kommunurnar fáa fyri eldraøkið verður goldin inn til Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy, treyta av allar kommunur í samstarvinum taka undir við hesum.

## 67/22
## 22/00301-2 Tvøroyrar skúli -Leasingsáttmáli og sáttmali viðv. skúlanet

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 25.08.2022 | 68/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 14.09.2022 | 77/22 |
| 3 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 88/22 |
| 4 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 103/22 |
| 5 Býráðið | 24.10.2022 | 67/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 27.06.2022**
Skúlastjórin hevur samskift við veitara av skúlanet, og mælir til at tikið verður av tilboði soleiðis at Tvøroyrar skúli verður partur av skúlaneti.

Avtala er at skúlastjórin, Jón Johannesen møtur á fundinum í mentanarnevndini.

**Skúlanet:**

*Skúlanet er skipað sum eitt samstarv millum Undirvísingarstýrið, Nám, KT Landsins, kommunur, skúlar og útbúgvingarstovnar. Talan er um eina felags rakstrar- og tænastuskipan, ið skal menna og reka eitt vælvirkandi og trygt kt-net fyri alt undirvísingarverkið.*

*Skúlanet skal loysa tær truplu kt-uppgávurnar fyri undirvísingarstovnarnar, og við vælvirkandi og tryggum kt-kervi gera tað lættari at samstarva. Lyklaorð eru trygd, synergi, standardisering og fyrimunir við stórrakstri.*

**Lógargrundarlag:** Fólkaskúlin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ 2022, 410 Fólkskúlin **Ongin**

*Kostnaðurin fyri skúlanet pr/ár við verandi næmingatalið (239) og antal neteindir verður kr. 155.280,-*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 25. august 2022:**
Eingin játtan er til endamálið.
Nevndin ynskir, at umsitingin kannar um Kommunufelagið hevur havt málið til viðgerðar, og um tað er ein kommunal uppgáva. Málið verður tikið uppaftur á komandi fundi, og Jón Johannesen verður boðin á fund.

**Kommunustjórin 12.09.2022**
Kommunustjórin hevur samskift við Kommunufelagið um viðgerðina av Skúlanet. KF hevur viðgjørt málið og samtykt hetta sum lýst, við tilmælið um at kommunurnar sjálvar gera av, um tær ynskja at vera partur av Skúlanet.

Avtala er at skúlastjórin Jón Johannesen, møtur til fundin og greiðir frá um Skúlanet.

***Skúlanet:***

*Skúlanet er skipað sum samstarv millum Undirvísingarstýrið, Nám, kommunur, skúlar, útbúgvingarstovnar og Gjaldstovuna, sum umsitur Landsnet, og er líkt tilboðnum til almennar stovnar.*

*Skúlanet er nýggj tænasta, sum skipar felags KT loysnir og hjálp til allar undirvísingarstovnar í landinum. Krøvini til KT og KT trygd vaksa alsamt, og tí eru stórir fyrimunir við at miðsavna hetta øki.*

*Skúlanet er partur av heildarætlanini fyri KT umsiting í undirvísingarverkinum, ið varð løgd fram og handað Jenisi av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum í september 2020. Endamálið við heilsarætlanini fyri undirvísingarøkið er í stuttum at betra um KT og dátutrygd, lætta um fyrisitingina og gera samskifti millum skúla, starvsfólk, næmingar og foreldur smidligari.*

*Fyrstu kommunurnar í landinum hava gjørt avtalu við Gjaldstovuna um nýggja Skúlanet, og fleiri aðrar kommunur og almennir undirvísingarstovnar eru ávegis at gera líknandi avtalu.*

*Higartil hava fólkaskúlar kring landið í stóran mun sjálvir staðið fyri innkeypi og rakstri av kt-útgerð, forritum, kt-trygd v.m. Uppgávan at reka útgerðina hevur ligið hjá teimum lærarum á skúlunum, sum fáa tímar fyri at røkja kt-varðaruppgávur.*

*Ymsar yvirskipaðar kt-skipanir hava verið felags fyri allar skúlarnar í Føroyum, men tørvur hevur verið á enn betri samskipan og kt-trygd - og tað kemur við Skúlaneti, sum er skipað sum eitt samstarv millum Undirvísingarstýrið, Nám, KT Landsins, kommunur, skúlar og aðrar útbúgvingarstovnar. Skúlanet er ein felags rakstrar- og tænastuskipan, ið skal menna og reka eitt vælvirkandi og trygt kt-net fyri alt undirvísingarverkið, sum ásett í Fólkaskúlalógini.*

*Skúlarnir koma framhaldandi at keypa tólbúnað v.m., men uppsetingin verður miðsavnað hjá Skúlaneti, sum eisini tekur ábyrgd av trygdini á netinum.*

**Mentanarnevndin 14. september 2022:**
Jón Johannesen møtti á fundi at greiða frá um Skúlanet. Avgjørt var at Jón Johannesen kannar til næsta fund í Mentanarnevndini nær sáttmálagjøldini fella til gjaldingar.

**Kommunustjórin 15.10.2022:**
Skúlastjórin hevur sent umsitingini kunning um at gjaldið ikki fellur fyrr enn vit eru komin á skúlanet, og tað verður ikki beinanvegin.
Skúlarnir skulu kannast og tølini, sum eru rokniarkinum, skulu justerast. Hetta fyrireikingararbeiði verður gjørt eftir "først til mølle"-princippinum t.v.s. teir skúlar, ið melda til fyrst koma fyrst á skúlanet.
Vónandi svarar hetta fleiri av spurningunum.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar skúli verður partur skúlaneti, málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá Mentanarnevndini 18. oktober 2022.
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini at Tvøroyrar skúli verður partur av skúlaneti.

**68/22**

**22/00395-3 Samstarvsavtala um tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjins kommunu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2022 | 68/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2022**
Samb. tilbúgvingarlógina §8, stk 2, verður uppskot til samstarvsavtal løgdt fyri bý- og býgdaráðum til samtyktar, ið eru komin ásamt um at skipa fyri felags tilbúgving í Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjin Kommunu.

Tvøroyrar býráð hevur hin 26. feb. 2020, samtykt einmælt tilmælið hjá brunanevndini, at bjóða Fámjin kommunu uppí samstarvsavtaluna millum Tvøroyrar og Hvalbiar kommunu. Hetta sama hevur Hvalbiar kommunu á bygdaráðsfundi hin 27.04.2020.

Arbeitt hevur verði við felagstilbúgving fyri samstarvið, og er henda send til Fiskimálaráðið, ið varðar av økinum tilbúgving til góðkenningar hin 5 nov. 2020. Svar er komið frá Fiskimálaráðnum 25. Juli 2022, við viðmerkingum, ið eru sendir til tilbúgvingarráðgevan til viðgerðar.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 61 frá 15. mai 2012 um tilbúgving, sum broytt við løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020

*§ 8. Kommunala tilbúgvingin skal, við fyriliti til váðan í kommununi, vera før fyri at fyribyrgja, avmarka og bøta um skaða á fólk, djór, umhvørvi, virði og ognir í sambandi við skaðahendingar ella vanlukkur, ella tá hóttandi vandi er fyri hesum. Kommunala tilbúgvingin skal eisini vera før fyri at taka ímóti, hýsa og í neyðugan mun kostarhalda bráðfluttum og fólki, sum orsakað av neyðstøðu eru komin illa fyri.*

*Stk. 2. Kommunur kunnu, heilt ella fyri ein part, vera felags um kommunala tilbúgving. Avtalur um felags kommunala tilbúgving skulu góðkennast av kommunala eftirlitinum sbrt. § 51 í løgtingslóg um kommunustýri.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Tvøroyra býráð til støðutakan.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Einmælt samtykt uppskot til samstarvsavtalu um felags tilbúgving millum Tvøroyrar kommunu, Hvalbiar kommunu og Fámjin Kommunu

## 69/22 Lukka mál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 95/22 |
| 2 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 95/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 105/22 |
| 4 Býráðið | 24.10.2022 | 69/22 |

| | | |
|---|---|---|
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |
| | | |

**70/22 Lukka mál**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2022 | 70/22 |

# 71/22 Lukka mál

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 8/22 |
| 2 Býráðið | 31.05.2022 | 24/22 |
| 3 Býráðið | 29.09.2022 | 60/22 |
| 4 Býráðið | 24.10.2022 | 71/22 |

**Til kunningar**

## 40/22
## 22/00096-1 Skattatøl 2022

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.02.2022 | 2/22 |
| 2 Býráðið | 22.02.2022 | 5/22 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2022 | 3/22 |
| 4 Býráðið | 30.03.2022 | 6/22 |
| 5 Fíggjarnevndin | 21.04.2022 | 5/22 |
| 6 Býráðið | 05.05.2022 | 11/22 |
| 7 Fíggjarnevndin | 18.05.2022 | 6/22 |
| 8 Býráðið | 31.05.2022 | 21/22 |
| 9 Fíggjarnevndin | 23.06.2022 | 9/22 |
| 10 Býráðið | 30.06.2022 | 26/22 |
| 11 Fíggjarnevndin | 05.09.2022 | 14/22 |
| 12 Býráðið | 06.09.2022 | 29/22 |
| 13 Fíggjarnevndin | 22.09.2022 | 15/22 |
| 14 Býráðið | 29.09.2022 | 31/22 |
| 15 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 24/22 |
| 16 Býráðið | 24.10.2022 | 40/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 01.02.2022**
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2021/2022

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar: FÆ2022/23**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 22. februar 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Fíggjarnevndin 17. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 21. april 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 05. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 18. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 31. maj 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 23. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað.

**Býráðið 30. juni 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 05. september 2022:**
Nevndin er kunnað.

**Býráðið 06. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 22. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 29. september 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og nevndin er kunnað

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**41/22**
**22/00394-3 Uppskot til hoyring til Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skjalasøvn (Skjalasøvn við privatum savnindum)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2022 | 41/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2022**
Kommunustjórin hevur á starvsbólka fundi í kommunufelagnum, fingið hoyring um broyting í lóg um skjalasøvn.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til kunning.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað, einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna og skjalasavnið senda inn eitt felags skriv.

**42/22**

**22/00390-2 KF -uppskot til hoyring Løgtingslóg um bókasøvn (Bókasavnslógin)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 96/22 |
| 2 Býráðið | 24.10.2022 | 42/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 17.10.2022**
Uppskot til ll. um bókasøvn til hoyringar við freist 8. nov. kl. 12.00, verður sent tykkum sum kunning og til viðmerkingar, møguligar viðmerkingar skulu verða okkum í hendi seinasta lagi 1. nov. 2022.

**Samandráttir úr álitinum:**
Útgangsstøðið er, at øll hava rætt til bókasavnstænastur, at atkoman til bókasøvn er ein mannarættur hjá øllum, eisini borgarum við skredurm førleikum, at fólkabókasøvn eru kommunal, og at tað er ábyrgdin hjá øllum kommunum at veita sínum borgarum bókasavnstænastur.

Sambært yvirlýsingini eru bókasøvnini vegurin til vitan og ein hin mest avgerandi fortreytin fyri útbúgving, sjálvstøðugari støðutakan og mentanarligu menningini hjá tí einstaka og samfelagnum sum heild.

Í arbeiðinum við at dagføra bókasavnslógina er tað tí eisini týdningarmikið at geva sær far um, at bókasøvnini eru grundstuðlar í fólkaræðinum - at bókasøvnini eru ein mannarættur.

Umframt at vera stovnar fyri vitan og upplýsing, hava bókasøvnini stóran týdning fyri trivnaðin hjá borgarum og integratión av tilflytarum. Leikluturin hjá bókasøvnunum at fremja lesihugin, at miðla kunnleikan til og skapa áhuga fyri máli og bókmentum er alsamt vorðin meiri virkin. Menningin á bókasavnsøkinum er stór, ikki minst á talgilda økinum.

Fortreytin er, at øll bókasøvn, ið eru stuðlað við almennum pengum, eru almenn og opin, og at øll hava atgongd til vitan og upplýsingar.

Arbeiðsbólkurin ásannar tó, at møguleikarnir hjá fleiri kommunum í landinum einsamallar at reka eitt fólkabókasavn á fullgóðan hátt eru sera avmarkaðir, og at tað tí er neyðugt at finna eina loysn, har bókasavnseindirnar ikki verða ov smáar, men verða forsvarliga røktar av fakfólki og kunnu veita nøktandi tænastur, sum tað verður orðað í áliti um visjónir og viðmerkingar frá oktober 2014.

Í bókasavnslógini er ásett, at leiðarin á einum fólkabókasavni skal vera útbúgvin bókavørður. Útbúgvingin til bókavørð er seinastu árini broytt, og útbúgvingarheitið bókavørður verður ikki brúkt longur. Í flestu førum er í dag talan um kandidatútbúgving í informatiónsvísindum, mentanarmiðlan ella líknandi. Mælt verður tí til, at ásetingin verður broytt til, at starvsfólk skal hava fakliga viðkomandi útbúgving.

Í fleiri kommunum eru fólka- og skúlabókasøvn staðsett í somu hølum. Málbókarnir hjá fólkabókasøvnunum og skúlabókasøvnunum eru sera ymiskir, og tí er neyðugt, at viðurskifti so sum staðseting, innrætting, tilfar og upplatingartíðir verða lagað, so at bókasøvnini eru atkomulig hjá øllum, og at bókasavnstænastan er á einum nøktandi støði hjá øllum málbólkum.

**Tilmæli í álitinum**

Mælt verður til, at samráðingar verða tiknar upp við kommunurnar um at dagføra bókasavnslógina á fólka- og skúlabókasavnsøkinum út frá hesum fortreytum:

- At allar kommunur skulu hava fólkabókasavn ella á annan fullgóðan hátt veita sínum borgarum fólkabókasavnstænastu.
- At øll skúlabørn hava atgongd til skúlabókasøvn.
- At kommunur kunnu samstarva við aðrar kommunur um at veita fólkabókasavnstænastu, herundir eisini um keyp av tilfari.
- At verandi skipaninar við studningi frá landinum til fólka- og skúlabókasøvn verða strikaðar úr lógini og at landið og kommunur í staðin samráðast um aðra skipan.
- At fólkabókasøvnini skulu hava starvsfólk við bókasavnsfakligari ella aðrari fakliga viðkomandi útbúgving.
- At útbúnir skúlabókavørðir starvast á skúlabókasøvnunum.

**Lógargrundarlag: (Bókasavnslógin)**

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**

Málið var umrøtt og kunnað, uttan viðmerking.

**Býráðið 24. oktober 2022:**

Málið var umrøtt og kunnað

**43/22**
**22/00387-1 SALT -Kunning um árið 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.10.2022 | 93/22 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.10.2022 | 110/22 |
| 3 Býráðið | 24.10.2022 | 43/22 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 15.10.2022)**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir at bjóða stýrisliminum hjá Tvøroyrar kommunu "Charlotta Nielsen" á fund at kunna um og støðulýsa arbeiði í nevndini fyri Saltsilogrunnin.

**Lógargrundarlag:** Kommunusfulltrúin, Viðtøkur fyri Saltsilogrunnin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021, §534

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 18. oktober 2022:**

**Fíggjarnevndin 20. oktober 2022:**
Kunningin frá Mentanarnevndini 18. oktober um SALT er tikin til eftirtektar.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

**44/22**
**22/00397-1 TIL UMMÆLIS. Uppskot til løgtingslóg um klokkutíðina.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 24.10.2022 | 44/22 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 21.10.2022**
Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Ásett verður at klokkutíðin fyri Føroyar – normaltíðin - verður ásett at fylgja samskipaðu alheimsklokkutíðini (UTC) við einum tíma løgdum afturat (UTC+1). Hetta er tað, sum vit í dag kenna sum summartíð.

Vit hesum verður normaltíðin í Føroyum bæði vetur og summar UTC+1. Tá er sólhæddin altíð góðan hálvan annan tíma aftaná klokkutíðina. Tað verður altíð ein tími á muni millum Føroyar og Ísland, har vit eru ein tíma frammanfyri. Fasthalda danir summartíðina verður tíðarmunurin millum Føroyar og Danmark og Evropu ongin um veturin, men Danmark og Evropa verður ein tíma frammanfyri um summarið.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan og kunning.

**Býráðið 24. oktober 2022:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:35

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen